Eyðun Elttør á oljuráðstevnu í Lerwick:

# Ikki bert olja skal knýta okkum saman

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Tað var ein vælupplagdur og avgjørdur Eyðun Elttør, sum fór á røðarapallin í stóru samkomuhøllini í Lerwick í farnu viku og vendi sær til meira enn 200 umboð fyri oljuvinnu, fiskivinnu, myndugleikar og ikki minst til sjálvan bretska starvsbróðurin, Stephen Timms, sum eisini hevði leitað sær "longu" leiðina úr London til Lerwick.

Eyðun Elttør segði seg vóna, at orsøkin til at hann varð boðin við til oljuráðstevnu og 25 ára haldið fyri stovnanina av oljuhavnini Sullom Voe ikki bara var olja men meira fyri at menna verandi bond millum bæði fólkini. Hann vísti á orðini, ein møtir, tá man kemur til Lerwick, nevniliga "Med Logum Skal Land Byggja", eitt livandi prógv um felags upprunan. Meðan føroyingar hava livað við eini norðurlendskari siðmenning, hava hetlendingar verið partur av tí Anglo-Saxisku siðmenningini.

Hóast leiðirnar hjá báðum fólkunum hava gingið hvør sín veg, so setir nútíðarsamfelagið nýggj krøv til samfeløgini til eitt nú at sameina resursurnar til felags frama fyri hetta økið. Bæði oyggjasamfeløgini liva tætt við havið og eru livilíkindini nær tengd at, hvussu væl vit duga at fyrihalda okkum til havið og tess tilfeingi. Báðar tjóðir kenna ábyrgd fyri tilfeinginum og umhvørvinum og leggja seg eftir eini burðardyggari framtíð.

Hann vísti á, at tað eru gjørdar fleiri avtalur millum Føroyar og Hetland um mentan og vinnulív umframt flutning. Í hesum kjalarvørri kemur ferðavinnan, ein ídnaður, sum kann hava stóran týdning fyri samfeløgini. Elttør nevndi tí eisini Norrønu, sum er eitt gott dømi um eitt felags projekt, ið kann fáa stóran týdning fyri at knýta økini enn tættari saman. – Eg vóni vit fara at síggja aðrar verkætlanir við, sum kunnu menna samvinnuna uppaftur meira.

Landsstýrismaðurin nevndi í hesum sambandi, at um tað eydnast at økja um handilssambandið millum londini kundi verið ynskiligt við føstum beinleiðis flogsambandi og vísti á, at hann sjálvur var komin við flogfari beinleiðis úr Føroyum til ráðstevnuna.

Um oljuvinnuna segði Elttør, at føroyingar eiga at kunna læra av hetlendsku royndunum. – Vit hava kanska ymiskar siðir, mentan og bakgrund.Men vit eru bæði smá oyggjasamfeløg, vit eru bundin av einum reinum umhvørvi fyri fiskivinnuna og sum smátjóðir mugu vit eisini tryggja, at okkara umhvørvi ikki verður dálkað.

Eyðun Elttør helt tað vera sera umráðandi fyri føroyingar, áðrenn vit gerast oljutjóð, og tað gerast vit ein dag, legði hann dent á, at vit fáa góð ráð aðrastaðni frá. Hann greiddi so frá oljutilgongdini í Føroyum, sum hevur sannført føroyingar um, at oljuleiting tekur tíð. Landsstýrismaðurin segði seg hava hoyrt hetlendingar tosa um at fáa tí føroysku oljuna til Hetlands. – Eg skilji væl, at tit leita eftir nýggjum kundum fyri at halda lív í oljuhavnini her. Men sambart føroyska lóg skal øll olja upp á land í Føroyum. Landsstýrið kann gera undantøk frá hesi lóg. Men tað er eitt mál, sum vit ikki vilja viðgera, fyrr enn vit hava gjørt eitt lønandi fund. Tað hevði ikki verið klókt av mær í løtuni at sagt tykkum, um tað er rætt at taka oljuna í land í Føroyum ella flyta hana til Hetlands. Tann avgerðin fer í stóran mun at byggja á búskaparligu støðuna og arbeiðsstøðuna í Føroyum til ta tíð eins væl og støddina á tí fundi, sum verður gjørt. Eisini oljuprísurin og onnur viðurskifti spæla inn. So míni ráð eru, at tit í Hetlandi mugu ikki fyritaka tykkum nakað í løtuni í hesum máli og bíðið við at taka eina endaliga støðu, til tíðin er tann rætta.

At enda nevndi hann 2. Útbjóðing. – Tað er vón mín, at eg síðst í næsta ár kann bjóða út nýggj leitiloyvi á landgrunninum og at hetta fer at víðka um virksemi á landgrunninum.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaðurin í oljumálum varð ein av høvuðsrøðarunum á oljuráðstevnu í Lerwick í farnu viku*
*Mynd Jan Müller*

Bretski orkumálaráðharrin:

# Sær stórar møguleikar í varandi orku

**- men heldur kortini, at olja og gass fara at hava ein týðandi leiklut í mong mong ár enn**

OLJURÁÐSTEVNA Í HETLANDI
*Jan Müller*

Bretar ætla at leggja nógva orku í at menna varandi orkukeldur og hava sett sær sum mál at nøkta 20% av orkutørvinum við varandi orkukeldum so sum vindi, sól og alduorku um ár 2020. – Danir eru sera frammarlaga á hesum øki, ja teir bestu í heiminum, og vit vilja gera okkara til at læra av teimum, og tí fara vit eisini at gera nógv fleiri íløgur á hesum øki næstu árini sigur Stephen Timms, bretski orkumálaráðharrin í samrøðu við Sosialin. Hann vísir á, at uppá longri sikt verður orkutørvurin so nøktaður við enn bílgari og reinari orku sum vetni, men tað liggur nógv longur frammi í tíðini. Tí enn skal meiri gransking til.

Men hóast aðrar orkukeldur fáa størri týdning so verður kortini brúk fyri olju og gassi í nógv nógv ár aftrat. Hann sær fyri sær, at hóast varandi orkukeldarnar fara at fylla nógv meira, so verður kortini tørvur á kolvetni. Sjálvur ivast hann heldur ikki í, at nokk er til av oju og gassi til langt inn í framtíðina, í hvussu er í mong mong tíggjuár aftrat.

Á oljuráðstevnuni í Lerwick var eisini nógv gjørt burtur úr spurninginum um varandi orku. Og her ætlar Hetland sær at hava ein týðandi leiklut. Í løtuni verður roynt at skapa áhuga fyri at leggja ein kaðal úr Hetlandi og inn á meginlandið, sum skal flyta streym frá vindorku til nógv húsarhald á skotska og bretska meginlandinum. Hetlendingar hugsa sær at kunna nøkta kanska 20% av øllum elorkutørvinum í Bretland við vindorku. Í dag nøkta varandi orkukeldur umleið 4% av ensku elnýtsluni.

Eins og undanmaður hansara í orkumálaráðnum, Brian Wilson, so sær Stephen Timms eisini fegin, at føroyingar og eitt nú hetlendingar og skotar samstarva á orkuøkinum.

Meðan Bretland í dag framleiðir olju og gass til at nøkta alla sína egnu nýtslu, verður tað eftir øllum at døma um fá ár ein nettoinnflytari av olju og gassi og fer í 2020 helst at innflyta 75% av samlaða orkutørvinum. Hetta setir stór krøv til Bretland at troyta verandi olju- og gassgoymslur fult út umframt at menna varandi orkukeldur segði bretski orkumálaráðharrin á ráðstevnu í Lerwick nú um dagarnar. Ætlanin er, at varandi orkukeldurnar í 2010 skulu nøkta 10% av eltørvinum og 20% í 2020. Í hesum sambandi fer Hetland at spæla ein týðandi leiklut.

Bretland fer longu í ár 2006 at innflyta norskt gass frá Ormen Lange feltinum umframt frá norðurafrika og olju frá Ruslandi og Opeclondum.

Ráðharrin beyð tí teimum mongu nýggju og smærri oljufeløgunum um at vera vælkomin at troyta goymslur, sum eru funnar men sum liggja og bíða eftir at verða útbygdar til framleiðslu. Hann metti eisini, at meira lagaligar treytir til oljufeløgini fara at gagna einum øktum virksemi á landgrunninum. Hann ynskti eisini BP og hetlendingum tillukku við hesum fyrstu 25 árunum í oljuvinnuni í Hetlandi. Síðani Sullom Voe lat upp eru meira enn ein milliard tons av olju farin gjøgnum oljuhavnina ella tilsamsans 10.000 lastir.

Stephen Timms sá sera bjart uppá framtíðina, nú kanningar vísa, at Bretland er eitt av teimum bestu íløguøkjunum yvirhøvur og hetta fer vónandi eisini at merkja bæði tí 21. útbjóðingina, sum er farin í gongd og tí 22., sum verður latin upp næsta ár, og sum eisini fevnir um økið vestan fyri Hetland. Vit kenna ikki framtíðina í hesum øki segði hann men helt kortini, at her liggja stórir møguleikar fyri at finna olju og gass.



*Bretski orkumálaráðharrin Stephen Timms heldur størri dentur skal leggjast á at menna varandi orkukeldur. Her talar hann til 200 áhoyrarar í stóru samkomuhøllini í Lerwick*
*Mynd Jan Müller*



# Mugu standa saman í Europa

**– og verða kappingarfør við aðrar heimspartar**



*Tvær "kanónir" í arbeiðsgevarahøpi, Digby Jones, stjóri í bretska arbeiðsgevarafelagnum og Magni Arge, stjóri í Atlantsflog og formaður í Oljuvinnufelagnum, her á háborg hetlendinga í Lerwick*
*Mynd Jan Müller*

**Hetta var høvuðsboðskapurin hjá Digby Jones, gestarøðara við hátíðarhaldið í Lerwick mánakvøldið í farnu viku . Hann er stjóri í bretska arbeiðsgevarafelagnu m. Sosialurin hitti hann og spurdi, hví hann hevði lagt sær leiðina til eitt so fjarskotið stað sum Hetland.**

GESTARØÐARI Á VINNUDEGI
*Jan Müller*

- At tað eru 25 ár síðani oljuvinnan av álvara kom til Hetlands og Sullom Voe oljuhavnin varð tikin í brúk er ein stór hending fyri okkum øll í Bretlandi. Ikki bara tí at BP er ein av teimum størstu og mest týðandi fyritøkunum í Bretlandi, men eisini tí at Hetland hevur víst og prógvað, at tað hevur verið sera opið fyri íløgum, sum síðani eru komnar tess íbúgvum til góðar. Nú oljan og gassið minka krevur tað nýhugsan at møta framtíðar avbjóðingum, eitt nú hvussu tú vil brúka arbeiðsmegina, hvat BP og myndugleikarnir ætla og hvussu øll hesi liðini samam kunnu vera við til at tryggja Hetlandi eina góð og burðadygga framtíð.

Avbjóðingin er at kunna og duga at brúka hegni og royndir hjá fólkinum og laga hesi til morgindagin, soleiðis at man eisini kann troyta varandi orkukeldur sum vind, aldu og flóð og fjøru til at tryggja eina burðadygga gongd. Eg eri eisini sera fegin um, at hetlendingar eru farnir at hyggja at nýggjum leiðum eitt nú móti Føroyum, Íslandi og Noregi og fáa vinnulig sambond tann vegin – og ikki bara líta móti bretska meginlandinum og Europa. Bretland hevur altíð verið ein tjóð við handilsfólki, og tí er tað sera hugaligt, at eitt nú Hetland sær nýggjar handilsmøguleikar í Norðuratlantshavi.

Hóast hann hevur eina stóra ábyrgd og eisini stórt vald í Bretlandi í dag sum stjóri fyri bretska arbeiðsgevarafelagnum, hvørs limir, smærri og størri fyritøkur við 11 milliónir fólki í arbeiði, so viðgongur Digby Jones, at hann veit sera lítið um Føroyar, ikki meira enn tað hann lærdi í barnskúlanum, so hann er sera fegin um at hava fingið eina innbjóðing til at vitja Føroyar á Vinnudegnum næsta ár. - Tað sindri eg veit um tykkum er, at tit spældu javnt móti Skotlandi í fótbólti, og at tit og Danmark eru tætt knýtt.

## Magni beyð honum til Føroya

Tað var Magni Arge, stjóri í Oljuvinnufelagnum og nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum beyð honum til Føroya eftir ta karismatisku og dundrandi røðuna hann helt fyri 400 innbodnum í býráðshøllini í Lerwick næstseinasta mánakvøld.

Hetta er aðru ferð, at hann vitjar Hetland. Hann sær fegin, at bretar í størri mun vitja henda vegin, nú oyggjarnar eisini hava so stóran týdning fyri búskapin orsakað av oljuni og tær kunnu vera við til at byggja brýr millum bretska meginlandið og Europa og so samfeløgini í Norðuratlantshavi.

Digby Jones sær fleiri møguleikar í eini samvinnu millum Føroyar og Hetland. Eitt nú á tí tøkniliga økinum, tá tað snýr seg um at leita eftir olju og at taka sær av oljuni, tá tú hevur funnið hana. Eisini hevur tað týdning at gera sær greitt, hvussu ein stór oljuvinna kann broyta fólkið. - Tað er greitt, at tá tú er vorðin ein oljutjóð, so broytir tað eisini grundleggjandi lívið hjá íbúgvunum. Tað gevur vælferð men hevur eisini aðrar broytingar og avbjóðingar við sær, eitt nú sosialar. Eg haldi tí eisini, at eitt samstarv kann hava týdning fyri Føroyar, sum kunnu læra av Hetlandi, sum hóast oljuinntøkurnar hevur megnað at varðveita aðrar vinnuvegir, t.d. er fiskivinnan tvær ferðir størri enn oljuvinnan, og eg haldi, at føroyingar kunnu læra av tí. Sjálvur visti eg tað ikki, áðrenn eg kom til Hetland fyri fyrstu ferð seinasta summar.

Magni Arge sigur, at hann beyð manninum at vera ein av framsøgumonnunum má Vinnudegnum í september næsta ár, tí hann metti mannin at vera áhugaverdan fyri eina føroyska áhoyrarafjøld. Tað var ikki hálvtalað orð og hann tók av. Hann hevur altíð ynskt at koma til Føroyar. – Hetta er heldur ikki ein og hvør. Sum eg havi skilt er hann tann stóra kanónin í arbeiðsgevarafelagnum í Bretlandi og sigst at hava javnt og tætt samband við Downingstreet nr. 10. Tey, sum hoyrdu hann her í kvøld, skilu, at hetta er ein maður, sum hevur rættiliga gott yvirlit um støðuna og ótrúliga góð oratorisk evni og uttan iva eina stóra ávirkan á tey fólkini, sum hann kemur í nánd av.

## Boðskapurin

Boðskapurin hjá Digby Jones í røðu síni í sambandi við 25 ára dagin fyri Sullom Voe var rættiliga einfaldur. Hann var tann, at kappingin í heiminum verður harðari og harðari, har tú hevur Asia, Europa og Amerika í kapping við hvørt annað og fann Europa ikki út av at syrgja fyri, at teirra lond vóru kappingarfør við onnur, so fer Europa at tapa, og soleiðis sum hann upplivdi tað, so hevði man sera lítið skil í sínum egna húsi í Europa, har man spenti bein fyri hvørjum øðrum heldur enn at skapa góðar karmar, so man var kappingarførur. Tað sama upplivdi hann í Onglandi og teimum lokalu samfeløgunum í Onglandi, at man syrgdi ikki fyri, at teirra egna nærumhvørvi var kappingarført í tí stóra globala bílætinum. Tí tað er ein global hørð verð vit ganga ímóti, har tað ikki nyttar bara at sita og hyggja inn eftir í seg sjálvan. Vit verða noydd til at hyggja eftir, hvussu vit skulu klára okkum í kappingini við onnur. Tað var boðskapurin.

Magni Arge sigur, at boðskapurin var ikki nógv øðrvísi enn vit síggja tað aðrastaðni frá, men at tað var áhugavert at hoyra, hvussu umráðandi hann helt tað var fyri eitt land við 60 milliónum íbúgvum og í veruleikanum sá somu trupulleikar sum vit síggja við 50.000 íbúgvum.

Hann var sera skeptiskur, hvussu ES var bygt upp, hinvegin var hann ikki í iva um, at tað var neyðugt, at vit standa saman í Europa fyri at kunna klára seg í kappingini í framtíðini, men tað nyttar bara ikki at standa saman, um tú ikki kanst hava jøvn kappingarlig vilkor um alt Europa. Tað dugur ikki, at tað eru ójavnar fyritreytir í ymsum pørtum av Europa.

Hvat kann hesin maðurin tilføra Vinnudegnum næsta ár?

- Tað er altíð hugaligt at hoyra fólk, sum hava fingurin á pulsinum í størri búskapum, hvussu hesi síggja uppá tingini, men tey loysa ikki nakrar trupulleikar fyri teg. Tey geva tær neyðturviliga heldur ikki nakra loysn uppá, hvussu vit skulu bera okkum at í framtíðini, men tað gevur okkum eitt innlit í, hvat tey hugsa og hvussu tey síggja uppá tingini og tað kann man so fáa íblástur frá. Hinvegin er tað altíð stuttligt at hoyra fólk, sum sita í eini sentrali støðu aðrastaðni, hvussu veruleikin sær út í teirra eygum.

## Eiga at hyggja móti Bretlandi

Magni Arge telist annars millum tey, sum halda, at vit áttu at hugt meira móti Bretlandi. At vit ikki hava gjørt tað so nógv kemst av tí danska og harvið tí skandinaviska sambandinum, kanska alt ov nógv tí danska, og tað er harmiligt, tí Bretland liggur okkum so nær. Hinvegin er tað eisini ein spurningur um tíð at broyta eitt slíkt mynstur. Hyggja vit t.d. til 1990, so høvdu vit tá ongan íblástur bretsku megin frá. Í dag er íblásturin so nógv størri enn hann nakrantíð hevur verið. Tað kemur m .a. frá oljuvinnuni og tí sambandinum, sum er skapt til Aberdeen og eisini tí sambandi vit hava skapt okkum til London og aðrastaðni við samferðsluni, so vit eru í ferð við at broyta okkum til at vera eitt meira altjóða kent samfelag enn vit vóru fyrr. Og tað haldi eg er positivt.